# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Mítt mál er avgjørt ikki at taka gullmerkið í skattatrýsti frá svium. Vit skulu hava minni trýst*

*Kristian Jensen, skattamálaráðharri*

## Her druknaðu níggju smábørn

*Tann 19 ára gamla kvinnan hevði bjóðað teimum níggju børnunum heim til sín at eta. Kvinnan var lærari í meksikanska býnum Cárdenas, og tey níggju børnini, átta gentur og ein drongur, vóru millum trý og seks ára gomul. Men á vegnum rendi kvinnan í eina kanal. Tá løgreglan kom á staðið, var bara lærarin á lívi. Hon dugdi ikki at siga, hvat var hent. Hon hevði bara bjóðað børnunum heim til sín, tí tey høvdu spurt hana so ofta.*

*(Mynd: AP)*



## Tibetanar um at missa tolið

**Higartil hevur tibetanski uppreisturin ímóti Kina verið friðarligur, men fjúsið er farið at styttast**



*Tibetanar gingu eisini mótmælisgongu í nepalska høvuðsstaðnum Katmandu, men eisini har legði løgreglan uppí*

*Mynd: Reuters*

Í gjár gingu tibetanar kring allan heimin mótmælisgongu til minnis um teirra uppreistur ímóti kinesiska harradøminum. Eisini í sjálvum Tibert vóru mótmæli. Har gingu umleið 300 munkar ígjøgnum gøturnar í høvuðsstaðnum Lhasa, har teir kravdu, at munkar, sum sita í fongsli, skulu latast leysir.

Myndugleikarnir høvdu brynjað seg til mótmælini. Við eina vegabyrging stóðu trygdarhermenn við umleið10 hernaðarakførum og fleiri sjúkrabilum. Vesturlendskar keldur siga, at millum 50 og 60 munkar vórðu tiknir, men at eingin veit, hvar teir eru.

Í Nepal gingu nógvir tibetanar mótmælisgongu. Eisini har legði løgreglan uppí, at fleiri fólk vórðu særd.

Talsfólk hjá tibetanum í útlegd siga seg bera ótta fyri, at mótmælini í sjálvum Tibet fara at harðna, tí fólk halda ikki, at friðarlig mótmæli geva nakað úrslit.

## Danir hava heimsins størsta skattatrýst

**Eftir at sviar hava lækkað skattin, er Danmark komið á ovasta pláss við heimsins størsta skattatrýsti**

Í fleiri ár hava danskir politikarar skákað sær undan tosinum um stórt skattatrýst við at vísa á, at í Svøríki var skattatrýstið uppaftur størri. Men soleiðis er ikki longur, nú svenska stjórnin hevur lækkað skattin. Nú er skattatrýstið í Danmark størri enn tað svenska, og sambært Børsen bendir nógv á, at munurin verður enn størri í komandi árum.

Kristian Jensen, skattamálaráðharri, ásannar, at Danmark er komið upp á ovastu rók í skattatrýsti, men hann sigur tó, at ætlanin er, at skattatrýstið verður lægri í 2011 enn í dag.

- Eg havi avgjørt ikki sett mær fyri at taka gullmerkið í skattatrýsti frá svium, sigur Kristian Jensen við Børsen.



*Kristian Jensen, skattamálaráharri, ætlar at lækka skattatrýstið tey næstu árini*

*Mynd: Polfoto*

### STUTT SAGT

## USA hjálpir Póllandi

George W. Bush, forseti, segði í gjár, at hann hevur gjørt av, at USA skal hjálpa Póllandi at nútímansgera landsins hermegi. Tilsøgnin, sum kom eftir ein fund millum forsetan og polska forsætisáðharran, Donald Tusk, í Hvítu Húsunum, er partur av ætlanini hjá USA at seta rakettverjustøðir upp í Póllandi. Bush segði á tíðindafundi, at amerikanska stjórnin hevur ásannað, at polska hermegin hevur tørv á nýggjari útgerð, og at USA fer at lata Póllandi neyðuga útgerð, áðrenn ein annar forseti kemur í Hvítu Húsini í januar næsta ár.

## Ákæri fekk eiturbræv

Suðurafrikanski ákærin Moktathedi Mpshe, sum heldur eyga nýtsluni hjá oddamonnunum í stjórnini og tjóðartinginum, fekk í gjár eitt bræv við onkrum eitrandi evni í. Moktathedi Mpshi tók ikki sjálvur ímóti brævinum, men fimm av hansara medarbeiðarum gjørdust sjúkir eftir at hava havt brævið á honum ella verið í nánd av í, og øll starvsfólkini á skrivstovuni fingu boð um at fara út, sigur CNN. Suðurafrikanska løgreglan kannar nú málið. Hon vil ikki siga, hvat slag av eituri var í brævinum, ella hvaðan tað varr sent.

## Sudan krevur skaðabót

Myndugleikarnir í Sudan krevja nú, at Frakland skal rinda 40.000 amerikanskar dollarar í skaðabót fyri fýra sudanskar trygdarmenn, sum lótu lív, tá teir royndu at flyta líkið av einum fronskum hermenni, sum var deyður á markinum millum Sudan og Tjad. Teir fýra menninir doyðu av einari bumbu, sum brast, júst sum teir skuldu flyta líkið av franska hermanninum, sum var við í friðarvarðveitandi deildini Eufor. Tað vóru sudanskir stjórnarhermenn, sum skutu franska hermannin, tí hann sambært sudansku myndugleikunum var komin inn um sudanska markið.